# Eg havi ongantíð rópt upp

**- Eg havi ongantíð rópt upp, men eg geri tingini upp á mín máta., sigur Lisbeth L. Petersen, sum takkar fyri seg sum føroyskt fólkatingsumboð. Fyrrverandi forkvinnan í Sambandsflokkinum hevur fingið tjúkka húð av árunum á politiska víðvøllinum, har rangan ikki er so pen, og tú kanst merkja knívar í rygginum**

POLITIKKUR
*Heri á Rógvi*

Keypmannahavn:20. januar 2004 gjørdist ein rættur lagnudagur hjá Lisbeth L. Petersen. Sum formaður fyri Sambandsflokkin var henni og flokkinum spáddur stórsigur á løgtingsvalinum hendan dagin. Forsøgnirnar fóru tó skeivar, og atfinningarnar heglaðu niður á Lisbeth, eftir at úrslitið gjørdist, at Sambandsflokkurin fór úr átta tingmonnum niður í sjey.

Náttina eftir valið gjørdi hon av at fara úr formansstarvinum. Tað var eisini um somu tíð, at hon fór at hugsa um, hvussu hennara framtíð skuldi skipast. Tá tók hon avgerðina um ikki at stilla upp aftur til fólkatingsvalið.

Í dag ruddar hon upp á skrivstovuni á Christiansborg. Stórir ruskposar standa á kontóri 3-029 á triðju hædd í stásiliga slottinum hjá danska fólkatinginum. Lisbeth L. Petersen varð vald á fólkating við 2.288 persónligum atkvøðum við fólkatingsvalið hin 20. november 2001. Eftir trý ár sum føroyskt umboð á fólkatingi, hevur hon valt at gevast í royndunum at røkka fleiri árum á Christiansborg.

- Tað er av persónligum orsøkum, at eg havi valt ikki at stilla upp. Mín heilsustøða er heldur ikki so góð, sum hon hon hevur verið. Eg tók avgerðina fyri einum ári síðani, tá eg gjørdi av at raðfesta øðrvísi í lívinum, sigur Lisbeth L. Petersen.

Hon dylir ikki fyri, at tað hevur verið sera strævið. Serliga í tíðini sum formaður fyri Sambandsflokkin var tað nógv at skula røkja allar uppgávurnar, sigur hon. Men tað hevur borið til, tí øll gjørdu ein innsats fyri, at tað skuldi bera til, sigur hon og fyllir eitt sindur afturat í stóra posan.

Við nógv kontór á triðju hædd á Christiansborg verður fylt í posar í hesum døgum. Meðan valstríðið harðnar eru tey fleiri, sum takka fyri seg á Christiansborg, og onnur hava kanska tann stóru trúnna upp á, at tey verða afturvald.

Lisbeth er væl nøgd við sítt verk hesi seinastu trý árini á Christiansborg.

- Eg havi ongantíð rópt upp, men eg geri tingini upp á mín máta. Eg havi arbeitt nógv hesi trý árini, men eg havi dugað fólkaskikk og ikki lati meg provokera til at hava føroyskar bardagar í fólkatinginum, sigur Lisbeth L. Petersen.

## Dámd og kritiserað

Síðsta dagin í mánaðinum verður Lisbeth 66 ára gomul. Hon gjørdist leiðari fyri Sambandsflokkin í mars 2001, og tey næstu trý árini fylti Lisbeth L. Petersen nógv í føroyskum politikki.

Atfinningarnir móti henni hava eisini verið nógvir. Ikki minst eftir seinasta løgtingsval. Men eisini undan valinum. Ein av hennara fremstu kritikkarum Sjúrður Skaale segði á einum landsfundi Tjóðveldisfloksins, at eingin, sum fæst við samfelagsvísind, skilti, hví Lisbeth L. Petersen fekk so stóra undirtøku.

Men undirtøku hevur hon so havt og hevur væl framvegis. Fáir aðrir kvinnuligir politikarar hava vunnið sær so stóra undirtøku. Umframt 2.288 atkvøður á fólkatingsvalinnum í í 2001 og 644 í 1998, fekk táver-



## FAKTA

Sum limur í Fólkatinginum fær Lisbeth L. Petersen 43.213 krónur um mánaðin ella 518.561 krónur um árið í løn. Umframt lønina fær hon eina viðbót áljóðandi 65.977 krónur um árið.
Lisbeth L. Petersen er partur av tingbólkinum hjá Venstre á fólkatingi. Øll fólkatingsumboð hava rætt til skrivstovuhjálp. Peningurin, sum Lisbeth fær til hetta endamál, er partur av samlaðu upphæddini hjá Venstre. Tað er síðani Venstre, sum lønar skrivstovufólkinum hjá Lisbeth L. Petersen og hevur ábyrgdina av at lata roknskap fyri virksemi inn. Hon er partur av trimum nevndum í fólkatinginum, og hon var herfyri danska umboðið á einari ráðstevnu í Turkalandi.